# Leiðaraskeið við Gjógv

**Ungdómsleiðarar úr øllum Norðanlondum savnast næstu vikuna við Gjógv. Tretivu luttakarar verða við**

SKEIÐ
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Føroya Ungdómsráð skipar í samstarvi við NSU frá sunnudegnum 10. juli til leygardagin 16. juli fyri norðurlendskum leiðaraskúla í Gjáargarði. NSU, sum er stytting fyri Nordisk Samorganisation for Ungdomsarbejde, er mannað við stjórn úr øllum Norðurlondum. Umboðandi Føroya Ungdómsráð, hevur Jákup av Skarði verið stjórnarlimur í nøkur ár.

Endamálið við skeiðinum er at stimbra og menna ungdómsarbeiði. Leiðararnir fáa íblástur at standa fyri ungdómsarbeiði og at menna aðrar fyriskiparar, tá ið luttakararnir koma heim aftur.

Orð sum teambuilding og grundleggjandi leiðslu viðurskifti síggjast í skránni fyri skeiðið. Tað eru í stóran mun føroyskir fyrilestrarhaldarar, ið seta dám á skeiði. Jens Vang, Bogi Andreasen, Bergur Godtfred og Jákup av Skarði teljast millum fyrilestrahaldararnar.

Dentur verður lagdur á, at luttakararnir skulu bróta nøkur persónlig mørk og harvið mennast persónliga. Ein lutur í hesum er, at Bogi Andreasen og Jákup Jacobsen skipa fyri avbjóðandi túri í Koltri.

Bogi Andreasen er settur at leiða skúlan, og Jóanes E. Árting, ið er aðalskrivari í Føroya Ungdómsráð, hevur samskipað tiltakið seinasta árið.




KAMPANJUAVSLÁTTUR UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR




Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðnum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lyklaorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Enskt dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at uppliva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har altjóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævarøkt og vinnutænastur í Føroyum. Felagið røktar ognir fyri virki, stovnar og privatar íleggjarar og er fyrsta virðisbrævameklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Geneve og Luksemburg. 10 fólk starvast í Kaupting í Føroyum.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag